TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Starvsfólka-deildin

Starvsfólkadeildin umsitur starvsfólka- og lønarviðurskifti og ráðgevur í hesum sambandi miðfyrraðu deildir og stovnar kommununnar.

Á starvsfólkadeildini starvast fimm fólk. Harumframt eru tríggir næmingar knýttir at deildini.

Deildin umsitur tey yvir 1.000 fólkini, ið starvast hjá kommununi. Hesi eru sett eftir umleið 20 sáttmálum, ið øll á deildini tískil mugu hava innlit í.

www.torshavn.fo

## Málsviðgeri til starvsfólkadeildina

Ein av málsviðgerum okkara hevur tikið við nýggjum avbjóðingum, og verður tí søkt eftir fólki til hetta fjølbroytta starv hjá kommununi.

Høvuðsuppgávan hjá tær verður viðgerð av lønar- og starvsfólkamálum og aðrar uppgávur í hesum sambandi. Harumframt kemur tú at verða við til at menna ymisku forritini, íð starvsfólkadeildin umsitur og brúkar, soleiðis at deildir og stovnar kommununnar í størst møguligan mun sjálvi kunnu avgreiða síni viðurskifti gjøgnum dátunet kommununnar..

Umframt lønarskipanina verður arbeitt við øðrum elektroniskum skipanum, t.d. journalskipan, starvsfólkaskipan og vanligum skrivstovu forritum.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt sera spennandi og avbjóðandi starv við nógvum ymiskum uppgávum, har tú kemur at samskifta við leiðarar og starvsfólk kommununnar.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv, sum verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava skrivstovu- ella líknandi útbúgving og vera til reiðar at taka sær av nógvum ymiskum uppgávum. Góður kunnleiki til edv er neyðugur.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Janus Isfeldt, janus@torshavn.fo, ella Oskar Neshamar, oskar@torshavn.fo, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 14. juni 2004. Merk umsóknina "Starvsfólkadeildin".



# HANDIL TIL SØLU

Spennandi handil til sølu, ið selir klæðir o.a. til ung í øllum landinum.

Handilin liggur sera væl fyri í miðbýnum í Havn

Áhugaði kunnu ringja TEL 51 60 07



KEYP SPORTSFELGUR...




...við dekkum á alnótini



WWW.NORMEK.FO
FO-512 NORÐRAGØTA
TEL 44 20 02 · FAX 44 20 22



# TOYOTA MR2 Targa



**Árg 1991 · km. 245.000**

**til sølu á tel 311726 ella 210726**



# HALDIÐ SOSIALIN




**450,-** um ársfjórðingin
- sparið **395,-**
í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______________
Bústaður: ______________
Postnr.: ______________
Bygd/býur: ______________
Telefon nr.: ______________
Undirskrift: ______________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn




# TILTØK

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin, hvítusunnudag verður Morgunmøti við breyðbróting kl. 11 við Eiler Johannesen. Verið hjartaliga vælkomin í Saron.

**Vestmanna missiónshús**
1. hvítusunnudag kl. 19 Møti við Hellu og Regini Olsen úr Havn.

**Meinigheitshúsið, Sandavágur**
Sunnudagsskúli og møti sunnudagin eru avlýst við at hvítusunnumøtir eru í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági. Øll eru hjartaliga vælkomin til Sørvágs á familjumøti og møti.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við breyðbróting. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús v/ Leif Høj.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við kvinnum. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Elim, Søldarfjørður**
Hvítusunnudag kl. 12 Breyðbróting. Á møtinum kl. 18 koma nøkur í samkomuni at hava ein vitnisburð. Øll eru hjartaliga vælkomin.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti, talari er Joen Magnus Rasmussen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tabor á Toftum**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20, Loynikamarið og vit v/ Leilu Højgaard. Minst til at hava Bíbliuna við! Bønarløta ein hálvan tíma áðrenn.

**Gøta**
Tirsdag kl. 20 Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime v/ Peter O. K. Olofson: 1 Thess 4, 13ff.

**Thabor Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Hvítusunnudag verður einki tiltak í Thabor vegna 20 ára føðingardagshaldið hjá kirkjuni.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti, har evnið er Ísrael.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hvítusunnudagur kl. 18 Møti, Mogens T. Christensen, prestur í Hvalvík talar.
2. hvítusunnudag kl. 18 Møti, Jeffri Johannesen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Missiónshúsið á Strondum**
Á møtinum hvítusunnudag kl. 19 talar Torleif Johannesen. Vælkomin.

**Haldórsvík**
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti hjá Solveig og John Joensen. Og útimøti verður í kvøld kl. 21. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Hvítusunnumøtini byrja leygarkvøldið kl. 20 við Alfred Olsen. Sangur Jónhilda og Gulak.
1. Hvítusunnudag kl. 19 Møti við Hans Kristian Johannsen. Sangbólkur úr Leirvík. Innsavnan til ársgávuna hjá Heimamissiónini.
2. Hvítusunnudag kl. 19 Møti við Regin Høgnesen. Sangur Húsakórið.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 15 Barnagudstænasta í Christianskirkjuni.
Hvítusunnudag og 2. Hvítusunnudag felagsmøtir í Christianskirkjuni kl. 18.
2. Hvítusunnudag kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Møtini á Hvítusunnu við skopuningum í útisetri byrja leygarkvøldið kl. 20, Súsanna Hammer talar. Innsavnan til barna- og ungdómsarbeiði.
Hvítusunnudag verður møti kl. 19.30 vegna kirkjugongd, v/ Símin Hansen, innsavnan til húsið.
2. Hvítusunnudag kl. 16 Útimøti um viðrar. Viðrar ikki verður møti inni kl. 18. Jacob Hendrik Hansen talar, ymiskar sangkreftir luttaka á øllum møtunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin. Einki møti verður sunnukvøldið vegna Hvítusunnustevnu í Vági.

**Betel, Vágur**
Leygardagin kl. 10 Uppbyggingarfundur í Betel.
Hesir fundur verða í Ítróttarhøllini/Betel:
Leygardagin kl. 20 Evangel. fundur, kl. 22.30 Opið hús í Betel.
Hvítusunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 16 Uppbyggingarfundur, kl. 19 Evangel. fundur, kl. 22.30 Opið hús í Betel.
2. Hvítusunnudag kl. 10 Uppbyggingarfundur, kl. 15 Uppbyggingarfundur, kl. 20 Evangeliskur fundur í Betel.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Hvítusunnudag kl. 17 Familjumøti.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Evangel. møti v/ Eddie Bech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 5. juni giftast Elsebeth Joensen, Fuglafjørður og Óttar á Lofti, Sandavágur. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 16.00. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.30.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Sanna Poulsen og Jóan Pauli Joensen, Tórshavn. Veitslan verður hildin í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við atkoma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 322669, 223769 ella 223027.

Leygardagin 26. juni kl. 14.00 giftast í Fríðrikskirkjuni Jannet Hanusardóttir, Nes og Pauli Højgaard, Rituvík. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan leygardagin 12. juni á tlf. 448169, 262057 ella 447805

Leygardagin 26. juni giftast Laila Haraldsen, Argir og Sámal av Reyni, Tórshavn. Vígslan verður í Ebenezer kl. 14.00. Veitslan verður hildin kl. 18.00 í Reyni Service, Vegurin Langi, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 315829 ella 317899 ella senda ein teldupost til laila.haraldsen@kallnet.fo ella samal_reyni@yahoo.dk áðrenn 5. juni.

Leygardagin 26. juni kl. 16.00 giftast Thora Petersen og Búi Holm í Bíggjar kirkju. Brúdleypið verður hildið í Norðradali kl. 19.00. Tey,ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 228742 ella 580832 innan 6. juni.

26. juni kl. 16.00 giftast í Skopunar kirkju Annika Ryggstein og Remi Nicolajsen. Vælkomst verður í Samljóð kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá innan 12. juni á tlf. 361955, 361047 ella 361779.

Leygardagin 26. juni kl. 15.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Gudny Johannesen og Rodmund Magnussen á Signabø. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 14. juni á tlf. 421489, 421449 ella 421569.

Í samband við okkara brúdleyp og 50 ára føðingardag hjá Karl tann 29. juni, hevði tað glett okkum at sæð familju og vinir til døgurða í Sinding forsamlingshúsi fríggjadagin tann 2. juli kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf. 0045 97136669.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

Leygardagin 10. juli giftast Crista Sumberg Dahl og Bárður Mikkerlsen, bæði úr Vági. Vígslan verður í Bethel kl. 14.00. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin at siga frá inn 20. juni á tlf. 373877, 373827 ella 314447.

## SILVURBRÚDLEYP

23. juni hava Petra og Hans Jørgin Nysted í Hvannasundi verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsveitslan verður hildin á Hotel Norð 26. juni kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 452105 áðrenn 14. juni.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 29. mai, Fuglafjørður tlf. 44 40 38
Hvítusunnudag, Runavík tlf. 44 70 10
2. hvítusunnudag, Fuglafjørður tlf. 44 40 38

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.


...ljós, stakar, serviettar, stólar, beinkir, eskjur, vasar, taskur, pungar, lampur, pútur, kurvar, krukkur, kannur, teppi, grýtulappar, pappírskurvar, tallerkar, koppar, gløs...

**Nýggjur & spennandi handil letur upp 1. juni**



**Gløs**
»Pink Emotion«
Lekkur og einkul gløs og skálir við rosalittari rond.






**Viskustykki**
Ymisk mynstur
Viskustykki av høgari góðsku. Fáast í fleiri ymiskum litum og sniðum. Fáast eisini við hondbroderaðum mynstri.



**Lampur**
2 ymisk snið
Sera vakrar borðlampur. Fáast í 2 ymiskum sniðum og 3 ymiskum litum.

**Lanternur**
Fæst í fleiri litum
Lanterna til fýrfatsljós.



J. Paturssonar gøta 18
FO-100 Tórshavn
Telefon 31 68 08
Fartlf. 22 12 40

Vit halda til við síðuna av SaxO'føn

mammu'sa



**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 29.05. kl. 20:15
Leygardagin 29.05. kl. 23:00
Mánadagin 31.05. kl. 19:45
Mánadagin 31.05. kl. 22:30




Leygardagin 29.05. kl. 19:30
Leygardagin 29.05. kl. 22:45
Mánadagin 31.05. kl. 19:00
Mánadagin 31.05. kl. 22:15




Leygardagin 29.05. kl. 17:30
Mánadagin 31.05. kl. 17:00
– *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning – Billettprísur: 70,- kr.**
Fríggjadagin 11.06. kl. 16:30
Fríggjadagin 11.06. kl. 19:45
Fríggjadagin 11.06. kl. 23:00
Leygardagin 12.06. kl. 16:30
Leygardagin 12.06. kl. 19:45
Leygardagin 12.06. kl. 23:00
Sunnudagin 13.06. kl. 16:00
Sunnudagin 13.06. kl. 19:15
Sunnudagin 13.06. kl. 22:30
**Forsølan byrjar týsdagin 01.06 kl. 14:00**

**BIO KIOSKIN**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**